# Deildarleiðari

Verandi leiðari á deild okkara í Saltangará fer í annað starv, og tí er starvið leyst at søkja.

Uppgávan hjá deildini er at selja teldur, tilhoyr, egin forrit og at veita kundum okkara ymiskar tænastur í hesum sambandi. Kundar okkara eru sum heild vinnulívið í Eysturoynni. Deildin røkkur eisini út til alt meginøkið.

Á deildini eru í løtuni 5 starvsfólk.

Vit kunna bjóða eitt áhugavert starv í einum sera skiftandi og til tíðir hektiskum umhvørvi.

Leiðarin kemur, umframt at hava ábyrgdina av fíggjarligu gongdini og arbeiðsfólkunum, eisini at taka lut í sølu og tænastuvirkseminum.

Kunnleiki til teldur og ymiskan ritbúnað er ein fyrimunur.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn við nøkrum orðum um teg.

# IT–Supportari/ Datafagteknikkari

Til deild okkara í Saltangará verður søkt eftir IT–Supportara ella Datafagteknikkara.

Vit vænta, at tú ert fryntlig/ur og fyrikomandi og ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Um hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við nøkrum orðum um teg.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi 14. mars 2002.

**Com–Data P/F 736**
Postboks 19
Í Skálagarði
700 Klaksvík
att.: Olivur Thomsen

Götu Kommuna

## Gøtu Kommuna søkir

**1 dagrøktara**, at byrja skjótast tilber.

**1 sjúkraavloysara** fyri dagrøktararnar, at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøkið uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

## Til Dagstovnin søkist

**1 hjálparfólk** til arbeiði í stovu við 18 børnum í aldrinum 6–7 ár, starvið er tíðaravmarka frá 15. mars til 15. juli 2002.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna skiftandi tíðir.

**1 sjúkraavloysara** at byrja skjótast gjørligt.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn við avritum av viðmælum og øðrum skal sendast okkum áðrenn 11. mars 2002.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Box 32
511 Gøtugjógv



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Hjálparfólk til reingerð & farloyvisavloysarar til búfólkarøktina

Eitt starv sum hjálparfólk í reingerð er hervið leyst at søkja.

Starvið er í miðal hálva tíð pr. viku og lønt verður eftir Føroya Arbeiðsmannafelag.

Skrivlig umsókn við frásøgn um arbeiðsroyndir v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 18.3.02.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at vitja inn á gólvið.

## Røktarstarvsfólk til farloyvisavloysarar

Vegna farloyvi á H-deildini hjá eini sjúkrasystir uppá 0.62 tíð og einum heilsuatstøðingi uppá 0,55 verður søkt eftir avloysarum tíðarskeiðið ávíkavist apríl 2002 til apríl 2003 og mai til og við oktober 2002.

Umframt hetta verður søkt eftir eini sjúkrasystir uppá 0.70 tíð tíðarskeiðið mars til og við oktober 2002.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at vitja inn á gólvið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 18.3.02.

Setanartreytir sambært sáttmála ímillum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

# Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hettar áhuga so ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

# Frá Vestsalmon

**Kollafjørður**

Søkt verður eftir fólki at byrja beinanvegin. Arbeitt verður í trimum vaktum. Ring tlf. 421691 ella 220030.

VESTSALMON

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



HONDA
• Streymgeneratorar
• Vatnpumpur
• Grund/Dykkpumpur
• Sláimaskinur
• Bátamotorar
Kaj Andreasen & Co
Sosialurin - 311820

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1927, P/F Hotel Føroyar, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Zakaris Óli Andrias Martin Hammer, Marknagilsvegur 38, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Jóhannes Jensen, Millum Gilja 111, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 25. februar 2002

Kristin Balle

**Viðvíkjandi P/F 1264 , P/F Eysturoyar Reingering í likvidatión, 600 Saltangará**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya við hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mánaðar frá í dag at upplýsa um felagið enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, verður felagið strikað úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 27. februar 2002

Kristin Balle

veitst tú ikki tað?



**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Deildarleiðari til Almanna- og heilsumálastýrið

Eitt starv sum deildarleiðari fyri Fyrisitingarligu eindina í Almanna- og heilsumálastýrinum, verður við hesum lýst leyst til setan 1. apríl 2002 eftir nærri avtalu.

Talan er um leiðarastarv fyri stápseind við beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

**Høvuðsuppgávur:**
Deildarleiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av:
- Móttøkuni/vekslaranum, sum hevur um hendi:
- Telefon og viðskiftamóttøku, Klokkuskipan, Lyklar, Innkeyp, Reingerð, Fundarhøli, Journal/Post.
- Roknskaparhaldinum í AHS
- Bóka- og lógarsavninum í AHS
- Viðlíkahaldinum av AHS
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**
Skrivstovuútbúgving, vitan um almenna fyrisiting
Ávísar leiðsluroyndir
Kunnleika til Almanna- og heilsuøki
Kunnleika til journalisering og Doculive journalskipan
Kunnleika til EDV
Kunnleika til roknskaparhald.

**Løn og setanartreytir:**
Setanarøki er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.
Lønar- og setanartreytir verða samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
Starvið er flokkað í lønarflokki IV.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 30 40 50.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FR-110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 14. mars 2002 kl. 12.00.

# Talvkapping fyri børn

**Sunnudagin tann 3. mars kl. 13.00 til 18.00 í aulini í Eysturskúlanum**

**Kappingin verður skipað sum liðkapping. 4 telvarar á hvørjum liðið. Hvørt lið kann hava 1 eykaleikara.**

**10 min. hvør til hvørt talvið.**

**Tveir aldursbólkar: Upp til 4. flokk og 5. flokkur og eldri**

**Tilmelding á tlf. 220825. Tilmeldingarfreistin er fríggjakvøldið 1. mars kl. 20.00**
**Navn og skúlaflokkur hjá luttakarunum skal fylgja við tilmeldingini.**



**Havnar Telvingarfelag og TSF**

Lesið Sosialin

# Maskinsmiðir og sveisarar

Vegna økt virksemi sóknast vit eftir bæði maskinsmiðum og sveisarum at byrja skjótast gjørligt.

Sveisarar, ið hava sertifikat og royndir við at sveisa aluminium hava fyrimun.

Løn eftir avtalu.

Nærri fæst at vita, við at venda sær til Sigurd Poulsen á tel 471000 ella 217470.

HYDROTECH

Hydro Tech P/F • FO-470 Eiði
Tel 471 000 • Fax 471 001
info@hydro-tech.fo
www.hydro-tech.fo

# Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber.

Starvið er fjølbroytt og spennandi, og áhugavert fyri tann, ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.

Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur FHS ella HH, og samstundis er fryntligur og álítandi.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

**P/F Thomas Dam Ítróttur**
Postsmoga 268
FO-110 Tórshavn

# Norðoya Javnaðarfelag

## Uppstillingarfundur

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður í Bøgøtu 3, mánakvøldið 4.3. kl. 19.30.

**Nevndin**

www.sosialurin.fo